Tiðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Arnadóttir
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Justinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

Ítróttur: Jákup Mørk
Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin

Bústaður: Argjavegur 26, Argir
Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820 **Fax.** 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: P/F Prentmiðstøðin

Partafelagsdilla — vansi ella fyrimunur

Oddagrein

NÚ ljóðar aftur, at Postverk Føroya skal umskipast. Postverkið skal annaðhvørt umskipast til eina almenna fyritøku ella til eitt alment partafelag. Tað sigst, at landsstýrismaðurin er mest sinnaður fyri at umskipa Postverkið til eitt alment partafelag, hóast Tjóðveldisflokkurin í vár segði kortanei til at umskipa Postverkið til eitt alment partafelag.

GRUNDGEVINGIN fyri at umskipa Postverkið er hon, at Postverkið gevur hall, og tí má Postverkið útvega sær inntøkur á annan hátt. Tað kann ikki skiljast øðrvísi, enn at Postverkið skal taka upp kappingina við tey privatu flutningsfeløgini, sum hava tikið seg upp seinastu árini. Tey kunnu veita viðskiftafólkunum eina nógv betri og skjótari tænastu, enn tað heldur »tunga« Postverkið hevur kunnað gjørt, og hava tí veruliga tikið seg fram, samstundis sum Postverkið hevur siglt afturút bæði á ein og annan hátt.

Í HESUM sambandi kann spurnartekin setast við, um leiðslan í Postverki Føroya ikki hevur verið alt ov lítið framskyggin seinastu 10 árini. Tey, sum hava við Postverkið at gera, vita, at tøkniliga er Postverkið slettis ikki við. Sjálvt eitt so lítið amboð sum eitt telefax, sum 10. hvørt húski hevur í dag, finst ikki á fleiri av posthúsunum – sjálvt ikki í teimum størru bygdunum. Harafturat kann spurnartekin setast við, hví Postverkið ikki bygdi út Giro-deildina, og skipaði hana sum ein veruligan giro-banka, tá álitið á peningastovnarnar var niðri á nullpunktinum í 90-unum. Fyri tey nógvu hevði tað verið nógv lættari at havt ein giro-banka, tá hugsað verður um at senda ella flyta pening, sum peningastovnarnir nú krevja fleiri krónur fyri.

HARAFTURAT skal vísast á, at tænastustigið hjá Postverkinum er lækkað nógv. Afturlatingartíðirnar eru styttar og postur verður hvørki borin út leygardagar ella aftansdagar. Men tað hevur higartil ikki havt serligar sparingar við sær, tí starvsfólkatalið er neyvan regulerað í hesum sambandi, tá starvsfólkaavtalan frá fjørvár verður havd í huga.

TAÐ er løgið, at spurningurin um tænastuna og tænastustigið ikki verður umrøddur, nú ætlanin er at Postverkið skal umskipast. Tað verður bara talan um at umskipa Postverkið, men einki verður sagt um, hvat endamálið við Postverkinum skal verða, og hvørja tænastu tað skal veita. Tað virkar tí sum um hesin stovnurin og aðrir stovnar við skulu gerast til partafeløg, tí tað er ein »dilla« uttan at tann grundleggjandi spurningurin – tænastuveitingin – verður umrøddur.

Sosialurin

Viðmerkingar:

Pláss fyri 80 børnum afturat í dagrøktini

Dagrøktasskipanin er normerað og góðkend til 300 børn. Kortini eru bert 220 børn í skipanini í dag.

Orsøkin er, at tað hevur verið sera trupult at fáa nóg nógv dagrøktarheim í Tórshavnar kommunu seinastu árini.

Fyri at fáa dagrøktararheim til tey 80 børnini, sum skipanin hevur pláss fyri afturat, hevur býráðið gjørt av, at dagrøktir sjálvar kunnu ansa egnum børnum í dagrøktarsskipaninni.

Hetta hevur tó einki at gera við, at foreldur fáa gjald fyri at vera heima og ansa egnum børnum. Harafturímóti gera vit dagrøktarskipanina einfaldari. Við nýggju skipanini ber til hjá eini mammu, sum t.d. eigur tvey børn undir skúlaaldri, at taka trý onnur børn inn umframt síni tvey og harvið gerast dagrøkt hjá fimm børnum. Tað ber ikki til at vera dagrøkt bara hjá sínum egnum børnum.

Ætlanin við hesi broyting er at minka um trýstið á langa bíðilistanum til barnagarðspláss, har m.a. børn hjá dagrøktum í dag eru. Á henda hátt sláa vit tvær flugur við ein smekk: Vit fáa fleiri dagrøktir, og dagrøktir, sum í dag hava egin børn á stovni ella í aðrar dagrøkt, kunna nú hava børnini heima og geva pláss fyri øðrum børnum.

Fyri at ansa egnum børnum skalt tú rinda sama foreldragjald sum onnur. Um ein dagrøkt, sum ansar egnum børnum heima, fer í annað starv, fær viðkomandi tó ikki framíhjárætt fyri egin børn til annað pláss.

Í løtuni er nógv tey flestu dagrøktarbørnini undir trý ár. Hetta ger, at vit mugu hava fleiri dagrøktarheim enn frammanundan, tá vit loyvdu fimm børnum undir skúlaaldri - óasnæð aldur.

Henda skipanin er roynd við góðum úrslitum í Vestmanna, Klaksvík eins og í Danmark og Noregi. Talan er ikki um eina spildurnýggja skipan, eins og áður er fført fram.

Tórshavnar Kommuna vónar við hesi broyting at fáa fleiri egnað dagrøktarheim. Hetta er ikki fyri at økja um skipanina, men fyri at kunna bjóða ta tænastuna, sum skipanini er góðkend og ætlað til. Vónandi fer hetta at minka um bíðilistan.

Elin Lindenskov
forkvinna í sosialu nevnd

Gjalda sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum við donskum pengum!

Ferð eftir ferð verður fønt fram av fullveldisfólki, at vit sjálvi gjalda sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Men at hetta verður goldið við pengum, vit fáa í blokkinum, tykjast hesi fólk at gloyma

Fullveldispolitikarar føra ferð eftir ferð fram, at vit sjálvi gjalda fyri sjúkraviðgerð eitt nú á Ríkissjúkrahúsinum og at tað tí ikki verður nakar trupulleiki við júst hesum spurningi, sum er so sera, sera týdningarmikið fyri flestu føroyingar, um so verður, at vit taka fullveldi.

Síðst hevur Oddvør Johansen í Sosialinum nomið við henda spurning. At hon trýr fullveldispolitikarunum, er kanska ikki so løgið, tí sigur tú eina lygn ella kanska ein hálvan sannleika nóg ofta, so fert tú sjálvur at enda at trúgva, at tað er so.

Fáa pengar frá dønum til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum

Men at gjald fyri sjúkraviðgerð á ríkissjúkrashúsinum er ein partur av blokkinum, verður ikki nevnt. Í blokkinum fyri 1998 var henda upphædd 34,5 mió. kr. Men danir lata okkum sjálvi ráða yvir, um vit nýta hesar pengar til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum, á Landssjúkrahúsinum ella til hvítar ella svartar bøkur!"

So óansæð av »vit sjálvi gjalda« fyri hesa sjúkraviðgerð, so er hetta við penguum, vit fáa frá dønum til hetta endamál. Taka vit loysing ella fulvleldi, missa vit eisini hesar pengar umframt at vit vera útlendingar, eisini á Ríkissjúkrahúsinum við teimum skerdu møguleikum, hetta hevur við sær.

Er føroyska sjúkrahúsverkið afturhaldandi við at gjalda?

Sjúkrasøgan, Oddvør sigur frá, er áhugaverd. At sjúklingur liggur og bíðar eftir viðgerð, tí ongir pengar eru komnir, leiðir til tann náttúrliga spurningin: er føroyska sjúkrahúsverkið, umframt at vera afturhaldandi at senda sjúklingar á Ríkissjúkrahúsið, eisini afturhaldandi við at gjalda? Soleiðis er í hvussu so er í tí dagliga, at vánaligur gjaldari fær ikki kreditt, meðan ein góður gjaldari fær kreditt.

At sjúkrahúsverkið er afturhaldandi at senda sjúklingar á Ríkissjúkrahúsið, havi eg sjálvir verið vitni til: Fyrsta árið, blokktilskotið var komið í gildi, hevði eg barn við brunum hálsi á Landssjúkrahúsinum. Sjúkrasystrarnar mótmæltu, at barn mítt ikki bleiv sent til Ríkissjúkrahúsið. Yvirlæknin boygdi seg ikki fyri kravi mínum, um at senda barnið til Danmarkar, fyrr enn eg so sjávlur vildi átaka mær at gjalda flutning og viðgerð á Ríkissjúkrahúsinum. Viðgerðin, barn mítt fekk í Føroyum, vísti seg at vera fullkomuliga skeiv og kundi fført við sær 100% avlamni. Tíbetur fekk barn mítt onki mein av hendingini, takkað verið viðgerðini á Ríkissjúkrahúsinum.

Spara pengar at nýta til annað endamál

At talan í hesum føri var um at spara pening frá blokkinum til sjúkraviðgerð á Ríkissjúkrahúsinum og nýta peningin aðrastaðni, er heilt greitt.

Havi áður í grein í øðrum sambandi ditta mær til at greiða frá hesi sjúkrasøgu. Ta ferðina fekkaeg skriv frá sjúkrahústjóranum, har hann hótti meg við rættarmáli, um eg ikki alment avsannaði orðini í grein míni! Tað gjørdi eg ikki, men sjúkrahústjórin tók hóttanina aftur.

Johan Petersen

Tøkk

Eina hjartans tøkk veiti eg tykkum øllum,ið mintust meg á 100 ára degnum.

Takk fyri gávur, blómur, fjarrit og vitjanir í Gjáargarði. Ein serstøk tøkk til øll tykkum,ið hjálptu til.

Jesur verði við tykkum øllum.

Blíðar heilsanir
Andrea Sivertsen

St‡ri› fyri Nor›urlandahúsi› havt seinasta fundin

Skei›i› er runni›, og n‡tt st‡ri› skal nú finnast. Seinasti fundurin var í seinastu viku, tá alt st‡ri › var› savna›

STEFAN Í SKORINI

Enn er ikki gjørt av, hvør skal sita í st‡rinum næsta skei›. Ta› eru mentamálará›harrarnir í Nor›urlondunum, sum skulu velja ein lim í part í st‡ri›. Finland, Svøríki, Noreg, Danmark og Ísland hava ein lim, me›an Føroyar hevur tríggjar. Grønland og Áland kunnu luttaka vi› sum eyglei›arar, men bara Grønland hevur n‡tt henda møguleikan.

Teir tríggir føroysku limirnir eru Óli Mittún Petersen, Schumann Hansen og Karin Kjølbro, sum eisini hevur veri› næstforma›ur. Tey hava øll siti› eitt skei›, og kunnu tískil ver›a vald einafer› afturat. Limir í st‡rinum kunnu í mesta lagi sita tvey skei›.

Seinasti fundurin var miku- og hósdagin í seinastu viku. Umrødd vór›u vanlig mál sum rakstur, tólini, í› hoyra til húsi› og standurin í húsinum, sum er í lagi. Uppskot var frammi frá nøkrum av hinum limunum um, at alt starvsfólk í húsinum skuldi ver›a sett í eitt ávíst áramál, sum skuldi ver›a f‡ra ár.

Hesum settu føroysku limirnir seg ímóti, og ta› ver›ur eftir øllum at døma av ongum. Føroysku limirnir mettu, at ta› var óheppi›, um starvsfólk ikki kundu fáa fast starv í húsinum. Eisini vóru broytingarnar í sambandi vi› festivalarnar vi›gjørdar.

Schumann Hansen hevur siti› í st‡rinum, og hann heldur, at skei›i› hevur hilnast væl. Stjóraskifti› gekk smidliga fyri seg, og størri partur av virkseminum hjá húsinum er flutt úr Havnini út um oyggjarnar. Nú er 21 prosent av virkseminum uttanfyri Havnina, me›an ta› var 10 prosent á›renn.

St‡ri› fyri Nor›urlandahúsi› hevur havt sín fund. N‡tt st‡ri› skal setast 1. januar. Her eru limirnir savna›ir í Nor›urlandahúsinum fyri seinastu fer› Mynd: Jens Kr. Vang

Heimaforbundi› hjá Frelsunarherinum byrjar aftur

Heimaforbundi› hjá Frelsunarherinum hevur veri › virki› í nærum ein mansaldur, og eftir ein summarste›g eru kvinnurnar farnar í gongd aftur

STEFAN Í SKORINI

Heimaforbundi› er ein kvinnufelagsskapur hjá Frelsunarherinum, sum byrja›i í London í 1907. Í Føroyum byrja›i arbei›i› í 1930. Hesin felagsskapur er nú í Vági og Tórshavn.

Virksemi› hevur mest veri› at bundi› og seyma› til tey, sum tørva hjálp. Nú er ta› eisini ein hugnaløta, har kvinnurnar hava ymiskt hondarbei›i vi›. Vanligt er, at ein søga ver›ur fortald, og okkurt er til matna. Sjálvandi ver›ur eisini sungi› og andakt, har Gudsor› ver›ur lisi›.

Heimaforbundi› hjálpir samkomuni vi› at hava burturluting einafer› um ári›. Í ár ver›ur ta› 26. oktober. Heimaforbundi› hjálpir eisini til á annan hátt.

Missiónskvøld eru, har peningur ver›ur savna›ur inn til trú›bo›arar, i› tørva hjálp.

Eisini er ein genta á blindaskúla hjá Frelsunarherinum á Jamaika, sum heimaforbundi› er vi› at gjalda fyri, so hon kann halda fram á skúlanum.

Allar kvinnur eru vælkomnar hvørt hóskvøld kl. 20.00, og byrja› var› 7. sep.

Brutu hegnpelar í Havn

Løgreglan í Havn fekk um vikuskifti› bo› um, at onkur hev›i veri› og gjørt seg inn á nakrar hegnpelar vi› Dalavegin.

Pelarnir vóru tra›ka›ir ni›ur og brotnir. Eisini hegni› hev›i fingi› sítt.

Vakthavandi á stø›ini í Havn sigur, at ta› er eingin ivi um, at ta› er gjørt av mannahond, tí eingi tekin eru til at pelarnir eru árendir av bili.

st

Gjørdu óná›ir á farstø›ini

Seint seinnapartin leygardagin fekk løgreglan í Havn bo› um, at tríggir fullir mans gingu og gjørdu óná›ir á Farstø›ini.

Løgreglan sendi »salatfati›« á sta›i› eftir monnunum, sum vór›u tiknir vi› á stø›ina, har teir fingu hvør sín kliva at sova rúsin út.

Vakthavandi sigur, at talan var um gamlar kenningar hjá løgregluni.

– Teir vóru sleptir leysir sunnudagin, tá teir vóru vornir edrúir aftur, sigur hann.

Ein annar ma›ur var so miki› fullur, at hann fekk song frá løgregluni.

st

Sjey fer›sluóhapp í Havn

Um ta› var tí, at fólk høvdu skund ella um onnur orsøk var, vita vit ikki, men veruleikin er, at ta› vóru sjey smærri fer›sluóhapp í høvu›ssta›num um vikuskifti›.

- Talan var um smá óhapp, men kortini vóru tey lutfalsliga fleiri í tali enn tey vanliga eru, sigur vakthavandi.

Løgreglan í høvu›sta›num brúkti annars nógva tí› á gøtuni hetta vikuskifti›. Nógv fólk var í b‡num, men har gekk alt fri›arliga fyri seg. Løgreglan ste›ga›i eisini fleiri bilum. Onkur var uppskriva›ur fyri eitthvørt smávegis, men eingin var tikin fyri rúsdrekkakoyring hetta vikuskifti›.

st

Vikuskifti í
ABERDEEN
Vikuskiftis tilboð galdandi hósdag - mánadag

Skene House Rosemont
Prísir pr. persón um 6 fólk búgva saman kr. **2.310,-**

Thistle Altens***
Prísur pr. persón í dupultkamari kr. **2.710,-**

Copthorne Hotel****
Prísur pr. persón í dupultkamari kr. **2.950,-**

Vikuskiftistilboð frá Europcar
Frá fríggjamorgun - mánamorgun prísir úr kr. **1.044,-**

Nøkur tiltøk í Aberdeen í heyst

16 sept	Bob Dylan konsert
23 sept	Country Fair
23 sept	UU2 konsert
24 sept	Magic / Freddy Mercury Show
12 okt	Status Quo konsert
27 okt	Abbamania

Fótbóltur í heyst
Heimadystir hjá Aberdeen

09 sept	St. Johnstone
30 sept	Celtic
14 okt	Dundee
21 okt	Dunfermline

Atlantic Airways
TEL 333 900 · FAX 333 380